

Stjórin í norska dótturfelagnum hjá Faroe Petroleum. Kelda Offshore.no

# Faroe Petroleum eins nógv loyvi og Statoil

**Jan Müller**

22.01.2014 - 13:57

Oljan.fo

**"Full pott for Faroe" og "Faroe fik like mye som Statoil" eru nakrar av rósandi yvirskriftunum í norskum miðlum í morgun, eftir at tað varð greitt, at Faroe Petroleum hevur fingið eins nógv leitiloyvi í nýggjasta norska útbjóðingarumfarinum sum oljurisarnir Centrica og Statoil.**

**Tilsamans ikki færri enn 12 nýggj leitiloyi hava føroysku oljufeløgini fingið tillutað í seinastu norsku útbjóðingini. Í gjár frættist, at Atlantic Petroleum hevur fingið 2 loyvi, og í dag boðar Faroe Petroleum so frá, at tað hevur fingið 10 loyvi á norska landgrunninum. Ikki kann sigast annað enn, at føroysku oljufeløgini hava fingið fótin fastan í Norra. Talan er tó um norsk dótturfeløg hjá teimum báðum móðurfeløgunum.**

Faroe Petroleum kann ikki annað enn vera nøgt og errið, tí tað hevur eisini vorðið fyristøðufelag á tveimum av loyvunum. Vert er eisini at merkja sær, at Faroe Petroleum Norway er ikki nakar ársungi longur. Felagið er vorðið nógv ment seinastu árini og hevur fingið leitiloyvi í nærum øllum pørtum av norska landgrunninum, eisini í Barentshavinum. Felagið hevur fingið eins nógv loyvi sum tey stóru oljufeløgini Centrica og Statoil, ið hava fingið flest leitiloyvi saman við Faroe Petroleum.

**Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum sigur í eini viðmerking, at tey eru ovurfegin um tey nógvu loyvini, sum fara at leggja aftrat tí annars stóru og spennandi boriskránni hjá felagnum. Hetta er størsta talið av loyvinum, sum felagið nakrantíð hevur fingið tillutað í eini útbjóðing. “At vit verða jøvnsett við stór feløg sum Centrica og Statoil vísir, at vit eru góðtikin og viðurkend sum ein av teimum mest týðandi oljufeløgunum á norska landgrunninum.”**

